# Kappingarneytar leggja saman

**Café Natúr, Eclipse og Platform verður nú eitt felag. Orsøkin til samanleggingina er harða kappingini um kundaskaran millum tey trý skeinkistøðini**

SAMANLEGGING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*




*Nakað óvæntað leggja Platform, Café Natúr og Eclipse saman. Teir tríggir Petur Olsen, Toni Dam og Havgrímur Johannessen fara at reka felagið saman*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tey trý stóru skeinkistøðini, Platform, Eclipse og Café Natúr leggja saman. Teir tríggir, Havgrímur Johannessen, Petur Olsen og Toni Dam, sum eiga hesi skeinkistøðini eru komnir ásamt um at leggja saman, heldur enn at stríðast hvør ímóti øðrum.

### Harðari kapping

Í tíðindaskrivi vísa teir tríggir á, at kappingin er harðnað nógv. Platform byrjaði fyri hálvum triðja ári síðan, og fór við nógvum av kundunum hjá táverandi Club 20. Club 20 bjóðaði í summar Platform av aftur við einum nýggjum konsepti undir navninum Eclipse.

Eigararnir óttast, at tað verður ov strævið at røkja kundaskaran, ið ikki er nóg stórur at fylla bæði Eclipse og Platform í senn. Fyri at úrslitið ikki skal verða, at hvørki Platform ella Eclipse fara at standa seg í kappingini, hava teir valt at leggja saman. Platform, Eclipse og Café Natúr verða nú eitt felag.

Nøvnini verða tey somu, men kundabýtið verður javnari, og Havgrímur Johannessen, Petur Olsen og Toni Dam reka nú hesi trý stóru skeinkistøðini í felag.

### Dagligur leiðari

Eftir ætlan verður ein dagligur leiðari settur at taka sær av virkseminum hjá teimum trimum støðunum. Tað er framvegis ikki fastlagt, hvør dagligi leiðarin verður, men teir tríggir eigararnir arbeiða í løtuni við málinum. Havgrímur Johannessen kemur at taka sær av tiltøkum á teimum trimum støðunum.

Til ein dagligur leiðari er funnin, verður tað eisini Havgrímur, ið tekur sær av dagligu leiðsluni. Tá leiðarin er funnin, fer Havgrímur eftir ætlan í annað starv. Hetta verður eftir øllum at døma fyrst í komandi ári.

### Merkjast

Fleiri seta óivað spurning við, um kundin ikki hevði fingið betri sømdir, um talan var um framhaldandi harða og javna kapping millum Platform og Eclipse. Nú verður eitt stórt felag, har kappingin millum serliga Platform og Eclipse dettur burtur.

– Broytingin verður avgjørt til gagns fyri kundarnar, og tiltøkini verða meira spennandi og áhugaverdari í framtíðini. Vit fara at hava opið á sama hátt, sum tað hevur verið higartil, sigur Havgrímur Johannessen.

Betri møguleiki verður framtíðini at flyta tiltøkini millum støðini. Teir tríggir hava fleiri spennandi ætlanir í kvittanum, men tær framvegis bara á skriviborðinum.

Spurdur, hvørjar aldursbólkar nýggja felagið fer at leggja seg eftir, svarar Havgrímur, at tað er ikki endaliga avgjørt enn, men allarhelst verður pláss fyri bæði teimum yngru og eldru. Hann veitir vissu fyri, at kundarnir í framtíðini hava nógv spennandi og stórfingið í væntu.

Higartil hevur innanhýsis kappingin millum skeinkistøðini Platform og Eclipse/Club 20 verið hørð, og leiðararnir á báðum støðunum hava hildið seg eitt sindur aftur við at gera tey heilt stóru tiltøkini. – Bæði vit á Platform og Club ella Eclipse hava aftrað okkum at lýsa við stórum tiltøkum fleiri vikur undan tiltakinum, tí vit vóru bangnir at hin parturin fór við sama hugskoti, men hesin ótti verður nú endaliga beindur av vegnum, sigur Havgrímur Johannesen.

Tað er javnan komið fyri, at bæði Platform og Club 20 hava havt stór tiltøk sama kvøld. Úrslitið varð oftað, at bæði hølini vóru ikki meir enn hálvfull. Hetta fer so ikki at henda í framtíðini, har greið samskipan verður ímillum støðini.

### Starvsfólk kunnað

Mánakvøldið vórðu starvsfólkini á teimum trimum støðunum kunnað um samanleggingina. Havgrímur Johannesen sigur, at tørvur er á øllum fólkunum á teimum trimum støðunum, og tí skal eingin vænta at verða sagdur upp. Hann vísir á, at nú fara jólatiltøkini skjótt av bakkastokki, og tá er hugaligt, at fleiri fólk verða at taka av.

# Tónleikarar betri sømdir

**Tórshavnar Býráð hevur sett 250.000 krónur av til spælistað til tónleikarar í høvuðsstaðnum á fíggjarlógini komandi ár. Ein av stigtakarunum til eitt spælistað í Havn, Rógvi á Rógvu, fegnast um, at endiliga er gongd komið á málið.**

FÍGGJARLÓG HJÁ TÓRSHAVNAR KOMMUNU
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Seinasta hóskvøld samtykti eitt einmælt Tórshavnar Býráð fíggjarlógina fyri 2004. Sammett við 1. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum, eru nakrar broytingar at síggja á endaligu fíggjarlógini. Tónleikararnir í høvuðsstaðnum kunnu fegnast um, at Tórshavnar Býráð hevur játtað 250.000 krónur til nýtt spælistað.

Tónleikarar í Havn hava áður víst sína ónøgd við, at hølisviðurskiftini eru út av lagi vánalig. Millum annað vórðu undirskriftir savnaðar fyrr í ár, og nú tykist sum um Tórshavnar Býráð er vaknað. Sambært fíggjarlógaruppskotinum verður tað Gamla vaskaríið í miðbýnum sum skal gerast til spælistað.

Húsið hevur seinastu mongu árini staðið órøkt, og tær 250.000 er settar av til varðveita og umvæla húsini, so tey kunnu tæna einum góðum endamáli.

### Rógvi fegnast

Rógvi á Rógvu er ein av stigtakarunum til, at eitt nýtt spælistað í Havn verður fingið á føtur. Nú er tjúgu ár síðan Perlan varð tikin niður, og framvegis er einki spælistað til tónleikararnar. Rógvi fegnast um, at endiliga er gongd komið á málið, og hann vónar, at eitt nýtt tónleikastað nú verður veruleiki.

Spurdur um tónleikararnir hava sett trýst á Býráðið, nú pengar er settir av til spælistað, svarar Rógvi, at hann hevur sent eitt ótal av skrivum til Býráðið, men hann hevur ikki fingið nakað svar.



*Fyri góðum tveimum vikum síðan var mótmæliskonsert ímóti at heili tjúgu ár eru liðin, síðan gamla Perlan varð tikin niður. Um konsertin hevur gjørt útslagið er ilt at meta um, men Tórshavnar Býráð hevur síðan sett 250. 000 krónur til spælistað komandi ár*
*Mynd: Maria Olsen*

– Vit hava ikki hoyrt nakað frá borgarstjóranum persónliga, men tað hevur helst ávirkað, at brøv eru send, og vit taka tað, vit fáa, sigur Rógvi á Rógvu.



Dagrøktarmammurnar:

# Kenna seg úttrýstar

**Dagrøktarmammurnar í Tórshavnar Kommunu vita ikki, hvat framtíðin hevur at bjóða teimum. Í fjølmiðlunum hoyra og lesa tær um, at stovnstørvurin í kommununi verður nøktaður, meðan tær standa eftir og onki vita**

DAGRØKT
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Í spælistovuni á Kirkjuvegi 1 er friðarligt í morgun. Enn eru bara fá børn komin, tí tað er so tíðliga enn, so tær tríggjar vaksnu, sum eisini eru har, kunnu taka tað heilt róligt, tí enn er ikki tað stóra at gera.

Tað er týsdagur og í dag eiga Didde Jørgensen og Gunnvá Hansen tørn í spælistovuni. Saman við Jonnu Fjalsbak, sum er fast í spælistovuni, sita tey og hugna sær yvir ein kaffimunn og nýbakað franskt-breyð.

Men tað er ikki bara hugni og friður, ið eyðkennir tær annars so róligu dagrøktarmammurnar. Tórshavnar Kommuna er í fullari ferð við at nøkta stovnstørvin í kommununi, og enn vita dagrøktarmammurnar hvørki eitt ella annað um, hvat fer at henda við teimum í framtíðini.

– Útskiftingin av børnum er stór, so vit vita ongantíð, hvar vit standa. Og tað ger, at vit kenna okkum úttrýstar av kommununi, greiða tær frá.

– At ein ikki er tryggur er óbehagiligt, og tað, vit ynskja er ein klár útmelding frá býráðnum um, hvussu verður við dagrøktini í framtíðini.

### Dámar væl

Sjálvt um støðan er keðilig, so eru tær báðar dagrøktarmammurnar ógvuliga glaðar fyri sítt arbeiði.

Báðar valdu at fara heim at arbeiða, og tær siga, at tað er als ikki vist, at tær høvdu tikið av, um býráðið bjóðaði teimum eitt arbeiði á einum stovni ístaðin fyri starvið sum dagrøktarmamma.

– Dagrøktin eigur at vera verandi. Men sum er júst nú, so ynskja vit bara eina útmelding, líkamikið, um hon er positiv ella negativ.

– Tað skapar ótrygd, at vit onki vita og at leiðslan onki veit. Vit hoyra bara í fjølmiðlunum, at fleiri og fleiri stovnar verða bygdir. Men vit fáa onki at vita.

Leiðarin hjá dagrøktini í Tórshavnar Kommunu kann onki siga um hetta málið.

– Broytingar á økinum eru á veg, men málið er ikki búgvið til, at eg kann úttala meg um tað, sigur Brynhild Mohr, og vísir til býráðið.





*Hesi fittu børnini vóru í spælistovuni týsmorgunin, tá Sosialurin kom framvið*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

# Ongin skal sigast upp

**Borgarstjórin í Tórshavnar Kommunu, Jan Christiansen, sigur, at býráðið hevur ongar ætlanir um at siga nakra dagrøktarmammu úr starvi tá stovnstørvurin verður nøktaður í 2005**

DAGRØKT
*Ingrid Bjarnastein*
*ingrid@sosialurin.fo*

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, hevur lovar, at tá valskeiðið er úti, so hava borgarar í kommununi ansingartrygd til børnini. Og hetta lyftið verður hildið, tí aftaná summarfrítíðina komandi summar, so hava øll børn yvir eitt hálvt ár í kommununi fingið ansingarpláss.

Tørvurin verður nøktaður við trimum skipanum. Tað eru dagrøkt, vøggustova og barnagarður. Men sambært borgarstjóranum vísir tað seg, at ynskið hjá foreldrunum er at fáa børnini á ein stovn framum at fáa tey í dagrøkt. Hetta vísa umsóknirnar av ansingarplássum, har foreldur í størstan mun velja stovn framum dagrøkt.

– Men vit hava ongar ætlanir um at siga nakra dagrøktarmammu úr starvi komandi árini. Tá tørvurin verður nøktaður, verður talið á dagrøktarmammum møguliga minkað eitt lítið sindur, tí tørvur verður á at hava pláss til 100 dagrøktarbørn, greiðir Jan Christiansen frá. Men hann undirstrikar, at um talan skuldi verið um eina minking av dagrøktarum, so fáa teir bjóðað annað starv.

Borgarstjórin vísir á, at í og við, at Tórshavnar Kommuna kann veita borgarunum ansingartrygd, so kann ein eisini vænta, at tilflytingin veksur. Og tí kann tað væl vera, at talan als ikki verður um nakra minking.

– Men um nøkur minking verður gjørd, so verður tað ikki fyrr enn í 2005, tá tann seinasti stovnurin verður klárur, slær Jan Christiansen fast.

